e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialin kunnu tit sjálvandi eisini lesa á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Fýra lokaluppgerðir á skránni

*Fýra dystir verða leiktir í hondbóltslandskappingini hjá kvinnum og monnum í kvøld, og sermerkt fyri allar teirra er, at talan alla staðni er um lokaluppgerðir. Størsti spenningurin man tó vera um úrslitið, tá havnarliðini bæði hittast hjá báðum kynum*

JÁKUP MØRK

Fýra hondbóltsdystir verða leiktir í kvøld, og eru tríggir teirra í bestu mansdeildini, meðan fjórði dysturin verður í kvinnudeildini.

### Silvurdystur

Hjá kvinnunum eru tað tey bæði havnarliðini, Kyndil og Neistin, sum bresta saman í einum dysti, sum væl kann vísa seg, at vera avgerandi fyri, hvat av havnarliðunum fer at standa seg betri í silvurstríðnum, har VÍF tó eisini hevur nøkur orð at siga.

Fyri Neistan man tað helst kennast sum dyggur smeitur, at Ileana Manolescu ikki verður við, eftir at hon fekk reyða kortið sunnudagin, tá Neistin og VB leiktu.

Einki er at ivast í, at rumenin hevur verið ein góður fongur hjá Neistanum, síðani hon kom til landið, og kanska hevur hon leikt sínar bestu dystir móti júst Kyndli.

Kyndilskvinnurnar eru helst sera uppsettar til henda dystin, tí tað er eingin loyna, at mistu stigini móti Neistanum hava verið teimum dýr higartil.

Megna kyndilsgenturnar at vinna dystin, er lítil ivi um, at tær í hvussu so er enda framman fyri Neistan, tí sum einasti av silvurbiðlunum, hevur Kyndil leikt báðar dystirnar móti Stjørnuni.

### tríggjar lokaluppgerðir

Eftir at tey bæði kvinnuliðini hava leikt, skulu menninir hjá havnarliðnum báðum royna seg.

Higartil í ár hevur Kyndil verið í teirri heldur óvandu støðu, at teir hava liðið undir, hvørja ferð teir hava hitt Neistan í landskappingini.

Sum kunnugt gekst Kyndli tó betur í steypakappingini, har teir vísti ein øgiligan stríðsvilja í finaluni móti bláu grannunum.

Bæði liðini eru nakað skerd, nú seinasta lokaluppgerðin á árinum stendur á skránni.

Kyndil noyðist at verða Leiv Holm og Hannis Wardum fyri uttan, meðan Neistin ikki kann líta á Áka Mørk hesu ferð.

Leivur breyt hondina í steypafinaluni og hevur ikki spælt síðani, meðan Hannis hevur meitt sær ryggin, og ivasamt er, nær hann verður tøkur aftur.

Áki er í løtuni staddur uttanlands, og verður tískil ikki við í Neistahópinum.

Hini bæði oddaliðinin hjá monnum skulu eisini royna seg í kvøld, men í báðum førum er talan um dystir móti tveimum av botnliðnum.

Føroyameistararnir av Strondum skulu eystur um fjørðin at dystast móti Tjaldrinum, og lítið er at ivast í, at StÍF eru stórfavorittar at vinna dystin.

Eins stórir favorittar munnu vestmenningar eisini vera, tá teir skulu royna seg móti grannunum úr Kollafirði.

Talan verður sostatt um fýra lokaluppgerðir í kvøld, men hóast tað vanliga verður tikið til, at alt kann henda í slíkum dystum, so loyva vit okkum at gita, at spenningurin ikki verður serliga stórur í tveimum teirra.

## Støðan undan dystunum í kvøld

### 1. deild kvinnur

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 7 - 0 - 0 | 493 | 383 | 110 | 23 |
| 2 VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 398 | 356 | 42 | 15 |
| 3 Kyndil | 6 | 3 - 0 - 3 | 382 | 342 | 40 | 13 |
| 4 Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 346 | 343 | 3 | 13 |
| 5 VB | 7 | 1 - 0 - 6 | 424 | 452 | -28 | 6 |
| 6 Tjaldur | 6 | 0 - 0 - 6 | 285 | 452 | -167 | 0 |

### 1. deild menn

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 6 - 0 - 2 | 581 | 457 | 124 | 23 |
| 2 Neistin | 6 | 6 - 0 - 0 | 529 | 450 | 79 | 21 |
| 3 StÍF | 7 | 5 - 0 - 2 | 548 | 472 | 76 | 21 |
| 4 Kyndil | 7 | 5 - 0 - 2 | 539 | 460 | 79 | 17 |
| 5 KÍF | 8 | 3 - 0 - 5 | 453 | 566 | -113 | 7 |
| 6 H71 | 8 | 1 - 0 - 7 | 464 | 568 | -104 | 4 |
| 7 Tjaldur | 8 | 0 - 0 - 8 | 483 | 624 | -141 | 3 |

# Kenneth vann

*Moto-cross: 15 ára gamli gøtudrongurin, Kenneth Danielsen, vann um vikuskiftið fyrstu kappkoyringina hetta kappingarárið*

JÁKUP MØRK

Sum nevnt fyrr í Ítrótta-Sosialinum, so flutti Kenneth Danielsen undan hesum kappingarárinum upp 125 flokkin, eftir at hann áðrenn hetta hevði roynt seg á teimum súkklunum, sum hava ein 80 rúmsentimetra stóran motor.

Ikki kann sigast annað enn, at Kenneth fekk eina stak góða byrjan upp á árið, tí longu í fyrstu koyring síni hetta árið, eydnaðist honum at gerast nummar 1.

Koyrt varð í tveimum umførum, ella heatum. Fyrsta umfarið megnaði hann at vinna seg av einum áttanda plássi upp á triðja pláss, og seinna umfarið gekst enn betur. Tá hevði hann eina byrjunastøðu á fimta plássi, og megnaði so líðandi at vinna seg upp á fremsta plássið.

Tá alt var lagt saman, var ungi gøtudrongurin sostatt á fyrsta plássi. Sanniliga eitt gott úrslit, tí umframt at hetta er fyrsta koyring hansara í flokkinum, telist Kenneth eisini millum yngstu koyrararnar í flokkinum

Venjari hjá Kenneth er navnframi danin, Jesper K. Jørgensen, sum áður hevur verið evropameistari í 250 flokkinum, so lítið er at ivast í, at føroyingurin er í góðum hondum.



*Kenneth Danielsen gjørdi ikki mætari enn at vinna fyrstu kappkoyringina hetta árið*

# Stórkapping í fimleiki

Sunnudagin 5. mars verður tann árliga stórkappingin í rútmiskum fimleiki í ítróttarhøllini á Hálsi. Tilsamans tíggju lið úr fýra fimleikafeløgum luttaka í teimum fýra aldursbólkunum pinkur, smágentur, gentur og kvinnur. Fimleikafeløgini, ið eru við, eru Støkk, HF, Ljósið og Fok. Harumframt verða gestalið við úr HF, Støkk og Ljósinum.

Hjá pinkum eru fýra lið, sum skulu kappast móti hvørjum øðrum. Í kappingini hjá smágentum luttaka trý lið og hjá gentum skulu tvey lið kappast. Bert eitt lið er við í kappingini hjá kvinnum í ár, og tískil er talan ikki um kapping, men tær fáa tó eina støðismetan.

Pinkur kappast bert við eini seriu, meðan smágentur, gentur og kvinnur gera eina fría seriu og eina við amboði. Í ár hava smágentur hoppiband sum amboð, gentur gera fimleik við bólti og kvinnurnar nýta vimpul.

### Dømingin

Tann føroyska stórkappingin koyrir eftir somu reglum sum donsku Grand Prix-kappingarnar, men tó eru nakrar serligar viðtøkur bert galdandi í Føroyum.

Til stórkappingina eru fýra dómarar, sum geva karakterir umframt tveir høvuðsdómarar. Í stuttum kann sigast, at dømt verður bæði tøkniligt, har serligur dentur verður lagdur á torleikastøðið, og listarligt, har mest verður hugt eftir koreografiini. Umframt føroysku dómararnar, verða eisini tveir danskir dómarar við í ár.

Innmarsjurin verður klokkan 15.00, og síðani verða kappingarnar í hesi raðfylgju: pinkur (frí íðkan), smágentur (frí íðkan), smágentur (amboð), gentur (frí íðkan), gentur (amboð), kvinnur (frí íðkan) og kvinnur (amboð). Kappingin hjá pinkum og smágentum verður avgreidd við heiðursmerkjahandan áðrenn gentur og kvinnur koma inn á gólvið. Kappingin verður væntandi liðug klokkan 18.00 sunnudagin.



# Dreingirnir hjá Kyndli vunnu

*Finaluumfarið hjá dreingjum 10 ár varð leikt á Skála um vikuskiftið*

Nú kappingarárið er farið at halla, byrja fyrstu føroyameistararnir eisini at koma undan kavi.

Vanliga eru tað tey yngstu børnini, sum eru skjótast at avgreiða sínar kappingar, og soleiðis er eisini í ár.

### Kyndil vann

Seinasta vikuskifti var finaluumfarið hjá dreingjum 10 ár leikt inni á Skála, og har eydnaðist tað Kyndli at vinna heitið sum fyrstu føroyameistararnir í hesi øldini.

Ikki kann sigast annað enn, árið hjá dreingjunum hevur hylnast væl. Áðrenn farið varð undir endaspælið, vóru liðini býtt í tríggjar bólkar, har tey bæði fremstu liðini komu víðari.

Í hesum bólkum vann Kyndilsliðið allar sínar dystir, og heldur í finalubólkinum var nakað av mótstøðuliðnum, sum megnaði at standa teimum kurl.

Á myndini síggjast dreingirnir so við gullmerkjunum um hálsin saman við venjara sínum, Lotte K. Sørensen, sum stendur fyri ungdómsvenjingini hjá felagnum.

AftastBergur Sólsker, Teitur Hofgaard, Pætur Jørgensen og Lotte K. Sørensen, venjari. Fremst frá vinstru: Ivan Hofgaard, Andreas Poulsen, Tummas Pauli Joensen, Janus Jacobsen, Johan Ellingsgaard og Hans Ejdesgaard.

ÍtróttaSosialurin ynskir leikarunum og venjaranum hjartaliga tillukku við FM-heitinum.



# Nósa Cup

*Um vikuskiftið skipaði B36 fyri kapping fyri yngru deildirnar*

Kappingin bar heitið Nósa-Cup, og sum navnið sigur, var tað Føroya Banki, ið var høvuðsstuðul fyri kappingini.

Tilsaman høvdu eini 65 lið boðað frá luttøku, so tað var ein rúgva av dystum, sumskuldu fáast frá hondini, áðrenn endaligu vinnararnir vórðu funnir.

Væl gekst tó at avgreiða dystirnar, og sum skilst, gekst hampuliga væl at halda ásettu tíðarfreistirnar.

Nósa-Cup er ein afturvendandi kapping, sum B36 skipar fyri á hvørjum ári.

Á síðuni síggjast myndir av vinnarunum í ymsu aldursbólkunum.



*Manchester United vann í pinkulingadeildini*



*Brøndby vann kappingina hjá gentum 10-12 ár*



*Smápiltarnir hjá AB vunnu sín aldursbólk*



*Í piltadeildini vann HB*



*Kappingina hjá smágentunum vann HB*



*Føroyar vunnu kappingina hjá smádreingjum*



*Í dreingjadeildini gjørdist Herfølge vinnari*



*Hjá gentum 14-17 ár vann B36 kappingina*